# Uttanríkis- og vinnumálaráðið

**Løgtingið**

| | |
|---|---|
| Dagfesting: | 1. mars 2019 |
| Mál nr.: | 19/00084 |
| Málsviðgjørt: | KTH |
| Eftirkannað: | 27. februar 2019 |

**Løgtingsmál nr. 113/2018: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um trygd á sjónum** (Reglur um sjóuppmerking o.a.)

## Uppskot til

## Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um trygd á sjónum
(Reglur um sjóuppmerking o.a.)

### § 1

Í løgtingslóg nr. 165 frá 21. desember 2001 um trygd á sjónum, sum broytt við løgtingslóg nr. 30 frá 19. mai 2008, § 2 í løgtingslóg nr. 71 frá 30. mai 2011, løgtingslóg nr. 61 frá 17. mai 2013, løgtingslóg nr. 122 frá 15. desember 2014 og løgtingslóg nr. 85 frá 29. mai 2017, verður aftaná § 31 sett:

“**§ 31 a.** Landsstýrismaðurin, ella tann myndugleiki, sum landsstýrismaðurin heimilar til tess, kann stovna neyðugar siglingarskipanir og sjóuppmerkingar og heldur tær við líka.
*Stk. 2.* Landsstýrismaðurin kann áseta nærri reglur um siglingarskipanir og sjóuppmerkingar.”

### § 2

Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. januar 2020.

## Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

### 1.1. Orsøkir til uppskotið

Landsstýrið hevur gjørt av at yvirtaka málsøkini sjóuppmerking og vitaverk, heruppií siglingarskipanir (navigationssystemer) og skipsrov, smbt. § 1, stk. 2, nr. 18, í løgtingslóg um ræði á málum og málsøkjum.

Yvirtøkan er ikki nevnd í samgonguskjalinum, men hóast hetta ynskir landsstýrið at yvirtaka økini, m.a. tí tey hava tætt tilknýti til øki, sum eru á føroyskum hondum, heruppií trygd á sjónum, sum bleiv yvirtikið í 2002, og kort- og landmátingarmyndugleikan, sum samgongan hevur yvirtikið við løgtingslóg nr. 151 frá 12. desember 2018 um broyting í lóg um ræði á málum og málsøkjum.

Í sambandi við yvirtøkuna av sjóuppmerking og vitaverki er lógaruppskot um broyting í løgtingslóg um ræði á málum og málsøkjum løgd fyri Løgtingið, samstundis sum henda lógarbroyting í lóg um trygd á sjónum, sum m.a. heimilar landsstýrismanninum at seta í gildi ásetingar um sjóuppmerking v.m.

### 1.2. Galdandi lóggáva

Málsøkini eru í stóran mun stýrd á ólógarásettum grundarlagi.

Einasta lóg um virksemi viðvíkjandi vitum o.t. installasjónum er lov nr. 68 af 29. marts 1893 om Afståelse af Grund til Fyranlæg m.m.

Í § 5 a í lov nr. 118 frá 28. marts 1951 om forholdsregler til skibsfartens betryggelse, við seinni broytingum, sum varð sett í gildi í Føroyum, var heimild at áseta nærri reglur um sjóuppmerking v.m. Lógin varð avtikin í sambandi við yvirtøkuna av málsøkinum trygd á sjónum í 2002.

Bekendtgørelse nr. 229 frá 4. april 1989 om afmærkning m.v. i dansk afmærkningsområde hevur heimild í lógini um forholdsregler til skibsfartens betryggelse. Kunngerðin er ikki kunngjørd í fullum líki í Føroyum og hevur tí í útgangsstøðinum ongantíð verið galdandi í Føroyum. Hetta hóast tað m.a. í § 16 í kunngerðini galdandi í Danmark (bekendtgørelse nr. 45 af 22. januar 2015 om farvandsafmærkning i dansk og grønlandsk afmærkningsområde m.v.) stendur, at kunngerðin frá 1989 er galdandi í Føroyum. Kunngerðin frá 1989 inniheldur m.a. ásetingar um, hvør myndugleiki hevur ábyrgdina av økinum, um umsókn um sjóuppmerking og kunngerð av sjóuppmerking.

Løgtingslóg um trygd á sjónum, sum kom í gildi 1. januar 2002, tá málsøkið trygd á sjónum varð yvirtikið, er ein rammulóg, ið gevur landsstýrismanninum víðar heimildir at seta gjøllari reglur í gildi. Sjóvinnustýrið umsitur í dag málsøkið trygd á sjónum.

### 1.3. Endamálið við uppskotinum

Endamálið við uppskotinum er at fyrireika føroyska lóggávu til yvirtøku av málsøkjunum sjóuppmerking og vitaverk.

Søfartsstyrelsen hevur í dag ábyrgd av økjunum, sum umframt umsitingarligar uppgávur m.a. fevnir um rakstur av 24 vitum.

**1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum**
Lagt er upp til, at tað í løgtingslóg um trygd á sjónum verður heimilað landsstýrismanninum, ella tí myndugleika, sum landsstýrismaðurin heimilar til tess, at stovna neyðugar siglingarskipanir og sjóuppmerkingar, heruppií vitar og føst og flótandi siglingarmerki, sum vegleiða sjóferðslu.

Harafturat er lagt upp til, at landsstýrismaðurin ásetur nærri reglur um sjóuppmerking, heruppií reglur um ábyrgd fyri, eftirlit við og loyvi til sjóuppmerking. Ætlanin er, at tær nærri reglurnar um sjóuppmerking í fyrstu atløgu skulu taka útgangsstøði í bekendtgørelse nr. 229 frá 4. april 1989 om afmærkning m.v. i dansk afmærkningsområde og í galdandi donsku reglunum.

**1.5. Ummæli og ummælisskjal**
Uppskotið hevur, saman við lógaruppskoti um broyting í løgtingslóg um ræði á málum og málsøkjum, verið í hoyring hjá Heilsu- og innlendismálaráðnum, Umhvørvisstovuni, MRCC, Arktisk Kommando, Ríkisumboðnum, Landsverki, Sjóvinnustýrinum, Vørn, og Samferðslumálaráðnum

Sjóvinnustýrið vísir á, at yvirtøkan hevur við sær nógvar nýggjar myndugleikauppgávur, og at pkt. 2.2. tí eigur at verða umorðað.

Uttanríkis- og vinnumálaráðið hevur umorðað pkt. 2.2. samsvarandi.

MRCC vísir á, at tað er avgerandi, at ritið, sum kemur fyri Efterretninger for søfarende, sum inniheldur siglingarávaringar, er klárt frá yvirtøkudegnum.

Uttanríkis- og vinnumálaráðið tekur undir við MRCC. Í tíðarskeiðinum til 1. januar 2020, tá lógin kemur í gildi, verður yvirtøkan fyrireikað, so føroyskir myndugleikar kunnu taka við ábyrgdini av økinum, uttan at hetta ávirkar raksturin av økinum.

Umhvørvisstovan setir í hoyringssvarinum fram nakrar spurningar, heruppií hví vitar og vitaverk ikki eru nevnd í sjálvari lógarásetingini, um tað átti at verði funnið eitt annað orð fyri "sjóuppmerking", hvat skilst við "neyðugar siglingarskipanir og sjóuppmerkingar" og hvussu hesar verða stovnaðar.

Uttanríkis- og vinnumálaráðið hevur í uppskotinum nágreinað, at m.a. vitar og føst og flótandi siglingarmerki er sjóuppmerkingar, fevnd av lógaruppskotinum. Siglingarskipanir (navigationssystemer) eru landfastar skipanir, sum virka sum vegleiðing fyri sjóferðslu, heruppií DGPS-skipanin á Bøllureyni. Greinin í lógaruppskotinum er ein heimildargrein, og tí fer landsstýrismaðurin at áseta nærri reglur um stovnan av sjóuppmerking v.m.

Heilsu- og Innlendismálaráðið, MRCC og Umhvørvisstovan hava gjørt vart við, at tað er umráðandi at greiða sum skjótast verður fingin á, hvør myndugleiki skal umsita málsøkið.

Landsstýrið fer í góðari tíð áðrenn yvirtøkudagin 1. januar 2020 at taka støðu til, hvør myndugleiki skal varða av málsøkinum sjóuppmerking og vitaverk. Mett verður, at fleiri almennir myndugleikar hóskandi kunnu varða av økinum, m.a. Sjóvinnustýrið, Landsverk og Vørn.

Søfartsstyrelsen mælir til, at føroysk lóggáva verður tillaga í sambandi við yvirtøku av skipsrovum v.m.

Uttanríkis- og vinnumálaráðið vil fram ímóti yvirtøkudegnum 1. januar 2020 taka støðu til í hvønn mun føroysk lóggáva skal tillagast.

Innkomnu ummælini eru hjáløgd sum fylgiskjal 4-9.

## Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

### 2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Tað kostar árliga 4,5 mió. kr. at reka málsøkini sjóuppmerking og vitaverk, og tí verður lagt upp til, at henda upphædd verður sett av til rakstur av økinum á komandi fíggjarlógum.

Víst verður til pkt. 2.1. í viðmerkingunum í lógaruppskoti um broyting í løgtingslóg um ræði á málum og málsøkjum, sum er lagt fyri Løgtingið samstundis sum hetta lógaruppskot.

### 2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Umsitingarliga verður mett, at yvirtøkan av málsøkjunum sjóuppmerking og vitaverk ikki hevur stórar avleiðingar við sær fyri landið.

Myndugleikauppgávurnar fevna m.a. um at viðgera umsóknir um sjóuppmerkingar, halda ognir við líka, luttaka í altjóða samstarvið og samskipa uppgávur millum ymiskar myndugleikar, m.a. Landsverk, komandi føroyska sjókortmyndugleikan, MRCC og Arktisk Kommando. Eisini fær myndugleikin ábyrgdina av at geva út nautisk tíðarrit, sum koma í staðin fyri tíðarritini Efterretning for Søfarende, Dansk Fyrliste og Afmærkning af danske farvande.

Víst verður til fylgiskjal 2 til lógaruppskotið, sum m.a. lýsir uppgávurnar á økinum.

Lógaruppskotið hevur ongar umsitingarligar avleiðingar fyri kommunur.

### 2.3. Avleiðingar fyri vinnuna

Uppskotið hevur ongar slíkar avleiðingar.

### 2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið

Uppskotið hevur ongar slíkar avleiðingar.

### 2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum

Uppskotið hevur ongar slíkar avleiðingar.

### 2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir

Uppskotið hevur ongar slíkar avleiðingar.

### 2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum

Sjóuppmerking, sum tryggjar trygga ferðslu á sjónum, er aloftast grundað á altjóða konventiónir, rættarsiðvenjur ella tilmæli. Altjóða verður sostatt miðað ímóti, at sjóuppmerking er eins í øllum heiminum.

M.a. IMO-sáttmálin SOLAS (International Convention for the Safety of Life at Sea), sum Føroyar hava staðfest, inniheldur reglur um at senda út siglingarávaringar, um at stovna sjóuppmerkingar og um at almannakunngera broytingar í sjóuppmerking. Víst verður til fylgiskjal 3 til lógaruppskotið, sum greiðir frá altjóða reglum á økinum.

Við yvirtøku av økinum, yvirtaka føroyskir myndugleikar ábyrgdina av, at altjóða reglur v.m. um sjóuppmerking – sum sjóuppmerking í Føroyum longu í dag livir upp til – verða fylgdar.

**2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar**

1) **Hoyvíkssáttmálin**
   Uppskotið hevur ongar fylgjur í mun til nevnda sáttmála.

2) **Evropeiski mannarættindasáttmálan, EMRS**
   Uppskotið hevur ongar fylgjur í mun til nevnda sáttmála.

3) **Sáttmáli Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek**
   Uppskotið hevur ongar fylgjur í mun til nevnda sáttmála.

**2.9. Markaforðingar**
Uppskotið hevur ongar slíkar avleiðingar.

**2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv**
Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um revsing.

Í § 49, stk. 2 í lóg um trygd á sjónum er heimild til, at tað í reglum, sum verða settar við heimild í lógini, kann ásetast revsing sum sekt ella fongsul upp í tvey ár fyri brot á reglurnar. Brúkar landsstýrismaðurin heimildina í lógaruppskotinum at áseta nærri reglur í kunngerð, kunnu tað tí ásetast reglur um revsing fyri brot á reglurnar.

**2.11. Skattir og avgjøld**
Uppskotið hevur ongar slíkar avleiðingar.

**2.12. Gjøld**
Uppskotið hevur ongar slíkar avleiðingar.

**2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?**
Uppskotið hevur ongar slíkar avleiðingar.

**2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?**
Lógaruppskotið heimilar landsstýrismanninum, ella tí myndugleika, sum landsstýrismaðurin heimilar til tess, at stovna neyðugar siglingarskipanir og sjóuppmerkingar. Lógaruppskotið heimilar eisini landsstýrismanninum at áseta nærri reglur um siglingarskipanir og sjóuppmerkingar.

**2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?**
Uppskotið hevur ongar slíkar avleiðingar.

**2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?**
Uppskotið hevur ikki aðrar avleiðingar enn tær, sum eru nevndar omanfyri.

**2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum**

| | Fyri landið ella landsmyndug-leikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss ella øki í landinum | Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umsitingarligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Ja | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | Nei | Nei | |

**Kapittul 3. Serligar viðmerkingar**

**3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina**

**Til § 1**
*§ 31 a, stk. 1* tekur útgangsstøði í § 5 a, stk. 1 í lóg nr. 118 frá 28. marts 1951 om forholdsregler til skibsfartens betryggelse við seinni broytingum, sum fyrr hevur verið galdandi í Føroyum, og § 8 í lov om sikkerhed til søs, sbrt. lovbekendtgørelse nr. 72 af 17. januar 2014, sum er galdandi í Danmark. Landsstýrismanninum, ella tí myndugleika landsstýrismaðurin heimilar til tess, verður heimilað at stovna neyðugar siglingarskipanir og sjóuppmerking og halda tær við líka. Innihaldsliga er ikki lagt upp til nakra broyting í mun til galdandi praksis, og skal sjóuppmerking eins og í dag vera við til at tryggja trygga ferðslu á sjónum.

Við sjóuppmerking verður m.a. hugsað um vitar, føst og flótandi siglingarmerki og tokulúður, sum virkar sum vegleiðing fyri sjóferðslu. Við siglingarskipanir verður hugsað um skipanir á landi, sum stuðla undir, at skip halda røttu kós, heruppií DGPS-skipanir.

*§ 31 a, stk. 2* heimilar landsstýrismanninum at áseta nærri reglur um sjóuppmerking í føroyskum sjóuppmerkingarøki. Ætlanin er, at landsstýrismaðurin í kunngerð ásetur reglur um m.a. ábyrgd fyri, eftirlit við og loyvi til sjóuppmerking.

**Til § 2**

Lagt verður upp til, at lógin kemur í gildið 1. januar 2020, tá økini sjóuppmerking og vitaverk verða yvirtikin av føroyskum myndugleikum. Víst verður til lógaruppskot um broyting av lóg um ræði á málum og málsøkjum um yvirtøku av sjóuppmerking og vitaverk, sum er lagt fyri Løgtingið samstundis sum hetta lógaruppskot.

Miðað verður ímóti, at kunngerð um sjóuppmerking eisini kemur í gildið 1. januar 2020.

Uttanríkis- og vinnumálaráðið, 1. mars 2019

**Poul Michelsen**
landsstýrismaður

/ Herálvur Joensen

**Yvirlit yvir fylgiskjøl:**
Fylgiskjal 1: Javntekstur
Fylgiskjal 2: Søfartsstyrelsens notat af 25. februar 2019 om spørgsmål i forbindelse med eventuel færøsk overtagelse af sagsområder på Søfartsstyrelsens område
Fylgiskjal 3: Søfartsstyrelsens notat af 25. februar 2019 om internationale aftaler og forpligtelser samt mødefora i forbindelse med de færøske myndigheders evt. overtagelse af sagsområder på Søfartsstyrelsens område
Fylgiskjal 4: Ummæli frá Umhvørvisstovuni av løgtingslógaruppskoti um yvirtøku av sjóuppmerking og vitaverki og løgtingslógaruppskot um reglur um sjóuppmerking.
Fylgiskjal 5: Ummæli frá MRCC av løgtingslógaruppskoti um yvirtøku av sjóuppmerking og vitaverki og løgtingslógaruppskot um reglur um sjóuppmerking.
Fylgiskjal 6: Ummæli frá Arktisk Kommando – forbindelsesled Færøerne - av løgtingslógar-uppskoti um yvirtøku av sjóuppmerking og vitaverki og løgtingslógaruppskot um reglur um sjóuppmerking.
Fylgiskjal 7: Ummæli frá Heilsu- og innlendismálaráðnum av løgtingslógaruppskoti um yvirtøku av sjóuppmerking og vitaverki og løgtingslógaruppskot um reglur um sjóuppmerking.
Fylgiskjal 8: Ummæli frá Sjóvinnustýrinum av uppskoti til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um ræði á málum og málsøkjum og løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um trygd á sjónum.
Fylgiskjal 9: Høringssvar fra Søfartsstyrelsen til færøsk lovforslag om overtagelse af afmærkning mv.